## DAGSINS MEINING

# Tingið til hús

Tingið skuldi í gjár fara til hús og fyrsta tingskeiðið hjá nýggju landsstýrissamgonguni er av, somuleiðis fyrstu 100 dagarnir. Tað má tí vera høvi at spyrja, hvussu gingist hevur hjá samgonguni. Tað er sjálvsagt í so tíðliga at meta um politikkin, men nakað bert tað tó til at siga um rikna politikkin. Á uttanríkispolitiska økinum tykist landsstýrið at hava havt hepna hond, serstakliga við atliti at ES og við at seta eina nýggja trygdarpolitiska dagsskrá. Í sjálvstýrismálinum hevur verið sera friðarligt og tykjast allir flokkar innast inni at vera samdir við hugsjónina um breiðu tjóðskaparliga semjuna hjá smgonguni. Størsta málið hevur verið tann nýggja fíggjarlógin. Samgongan legði út við enn fleiri sparingum, enn gamla samgonga longu frammanundan hevði mælt til við sínum fíggjarlógaruppskoti.

Hesin sparipolitikkur stendst helst av ynski samgongunnar um ikki at hækka skattir og avgjøld. So hendi tað, at ein samd fíggjarnevnd uttan um landsstýrið mælti til uppaftur fleiri skerjingar. Hetta førdi til fyrstu beinleiðis innanhýsis kreppuna í samgonguni. Landsstýrismenn gjørdu vart við, at skerjingarnar vóru so ógvusligar, at tær gingu út yvir tann politikk, ið teir høvdu sett sær fyri at reka við støði í samgonguskjalinum. Sum kunnugt kom til skarpskeringar og endin á hesum máli gjørdist tann, at fíggjarnevndarlimir samgongunnar boygdu seg og upprunaliga uppskotið hjá Bárði Nielsen varð í ávísan mun samtykt.

Tað, sum hendi í fíggjarnevndini, var áhugavert, tí tað var úrslit av eini sera áhugaverdari strategi hjá størra andstøðuflokkinum. Hesin flokkur hevur rikið ein sera semjusøkjandi politikk, síðan nýggja samgongan tók við. Hesin politikkur hevur eydnast so væl, at andstøðan í stóran mun hevur sett politisku dagsskránna á løgtingi. Hetta kann tykjast ein demokratisk gongd. Hetta kann tykjast sum tann heilt breiða politiska semjan. Men í roynd og veru kundi hesin politikkur eisini skiljast sum ein roynd at spjaða samgonguna, við tað at landsstýrið ikki fekk sett politisku dagsskránna. Tað man vera hetta rákið, sum fekk samonguleiðarar at sláa bakk og steðga hesum rákinum. Sæð frá samgongusíðu var tað skilagott, serstakliga tí tær skerjingar, sum andstøðan hevði fingið fíggjarnevndina at mæla til vóru ov ógvusligar. Eitt nú skuldi lærdi háskúli okkara, Fróðskaparsetrið steðgast í síni menningartilgongd. Nú kemur so eitt tíðaskeið, har landsstýrissamgongan veruliga skal vísa, hvat tað er hon vil. Tað fáa vit at síggja, tá løgmansrøðan og fíggjarlógaruppskotið fyri 2005 koma á borið. Tað eru tó fleiri mál, bæði negativ og positiv fyri samgonguna, sum kunnu viðgerast her, men tey venda vit aftur til. Eitt nú er tað sera óheppið at skerja játtanir til Menningarstovuna og Oljufyrisiting, ið nettupp skulu fáa búskapinum fleiri bein at standa á.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hetta er okkara land

**Súsanna Holm**



Hvussu ber tað, til at eitt gamalt fólk í Føroyum kann liggja í mánansvís á Landssjúkrahúsinum og ongin frá heimstaðarkommununi spyr til hetta fólkið?

Ongin áhugi er fyri tí hjá heimstaðarkommununi, ongin spyr eftir, hvussu veit við og um sjúklingurin kann fara heim aftur, kanska við eitt sindur meira av hjálp og stuðli, ella um so er at sjúklingurin ikki kann fara heim aftur, hvat síðani skal henda við hesum gamla borgaranum.

Sum avvarðandi er tað lætt at konstatera, at hvørt system arbeiðir í sínum lagi, hvør kommuna arbeiðir í sínum lagi. Systemini: Heimarøktin, Landssjúkrahúsið, Ellisheim og Sambýli eru løst føst í køssum og onki flow er ígjøgnum systemið. Almannamálaráðið hevur ikki makt til at áleggja kommunalum stovnum krøv, allastaðni sita upptøkunevndir ið hava evsta orðið at siga. Trupulleikar verða loystir ad hoc tvs. bert tann parturin, sum á einum ísfjallið, stingur upp í sjónum og er so grellur, har ið familjan ger dundrandi vrøvl, verður loystur. Alt annað, má man konstatera, hava starvsfólk og leiðslur innan endraøkið ikki møguleika til loysa, orsakað av einari miðvísari niðurpíning og niðurprioritering frá Løgtingi og Landsstýri. Hesin politikkur hevur nú staðið uppá síðani kreppuárini fyrst í nítiárunum. Niðurstøða mín er, at eldraøkið er eitt fullkomiliga óregulerað øki í Føroyum og á økinum valdar kaos.

Tí er áhugavert at spyrja seg sjálvan hví so er? Sjálv havi eg ongantíð verið kvinnusakskvinna, havi altíð trúð uppá hugtakið menniskja heldur enn kyn. Men í dag má eg ásanna at eg havi mistikið meg.

Tað eru vit konufólk, sum av náttúrligum orsøkum taka okkum av børnunum til tey flúgva frá reiðrinum, vit hava umsorganina fyri tí dagliga virkseminum í familjuni, vit eiga eisini ábyrgdina fyri okkara foreldrum, tá ið heilsan fer at bila. Men vit eru eisini modernaðar kvinnur, taka lut í samfelagnum og arbeiða líka nógv sum okkara menn.

Hyggja vit at okkara luttøku í tí politiska lívinum, eru kvinnur við at verða ein vanligur partur av einum bygdaráði, tó so at eg bert kann koma í tankar um at í Vestmanna eru kvinnur í meiriluta í bygdaráðnum. Í Løgtinginum sær øðrvísi út – tær fáu, ið hava megnað ta høgu gáttina inn á ting, verða enn sæddar sum eitt pikant kryddarí, ein kuriøsitetur. Eisini kunna tær tykjast mær dekan og kaldar, ella mansligar, tá ið tær uttan himpr atkvøða fyri niðurskerjingum á sosiala økinum. Hví so er kundi verið áhugavert at kanna. Men staðfestast kann, at Løgtingið er fylt við monnum, ið natúrliga mest hugsa um tøl, pengar, vinnu, tað vit kalla tey hørðu virðini. Tey øki, sum konufólk vanliga arbeiða við, menniskjum og umsorgan - tey bleytu virðini, koma snøgt sagt ikki á dagsskránna. At ójavnvágur er í Løgtinginum er tann kaotiska støðan innan eldraøki í Føroyum eitt talandi dømi um.

Vit hava ongan yvirskipaðan eldrapolitikk, hvar vit seta út í kortið hvørji virðir vit vilja tryggja okkara elstu medborgarum í landinum. Hvar vit seta upp mál og deilmál og hava eitt áramál at náa hetta í. Onki granskingararbeiði innan eldraøkið verður sett í verk, sum kann økja um vitanina hjá politikarum til at taka tær røttu avgerðirnar, nei eisini her skal alt kvalast. Eg havi hug at spyrja - hví skulu vit hava væl útbúgvið fólk í hesum landinum, tá í alt innan øll økir bara skal ana? Her er ongin gróður, ongin framgongd, onki hugflog og onki forvitni, alt skal bara standa í stað og helst skerjast.

Í dag arbeiðir hvør í sínum lagi, hetta sæst tá í Løgtingið uttan himpr vil áleggja kommununum at taka ábyrgdina av eldraøkinum, vælvitandi um at kommunurnar ikki megna hesa stóru uppgávu og vælvitandi um, at við hesum pressar man ein politikk ígjøgnum viðv. kommunusamanlegging. Ein politikk, sum man síðani 1. loysingarlandsstýri ikki hevur haft politiskan meiriluta fyri og vilja til at gjøgnumføra.

Landsins myndugleikar - Løgting, Landsstýri og Kommunurnar hava alt ov leingi brúkt vælviljan, tolsemi, ábyrgdarkensluna og samvitskuna hjá konufólkum til at snúgva sær undan ábyrgdini av eldraøkinum. Tað kann verða ein ómenniskjaliga tung byrða, at átaka sær at ansa sínum gomlu foreldrum, ofta í áravís. Nú er tíð uppá, at myndugleikarnir her á landi taka annað skinn um bak.

# Eg trúgvi

ÚTGÁVA

*Tíðindaskriv frá Heimamissiónsforlagnum*

Theodor Hansen hevur týtt bókina *Eg trúgvi* úr norskum eftir Carl Fr. Wisløff.

Í hesi stuttu trúarlæruni gevur Carl Fr. Wisløff eitt beinrakið svar, tá ið spurt verður: hvat er kristindómur? Eftir Bíbliuni og hinum luthersku játtanarskriftunum vísir høvundurin á grundvøll trúarinnar, og hvat trúgvin ber í sær. Høvundurin sigur okkum, at kristindómur er ikki, sum best ber til, men trúgv á Jesus Kristus.

Bókin lýsir høvuðsevnini í kristnu trúgv okkara. Til dømis, at hin heilaga Skriftin er innblást, myndugleika hennara, hin tríeinda Guð, skapan og syndafall, Jesus Kristus – Guð og menniskja, frelsuvegin, lóg og evangelium, náðievnini, trúboðan, hinar seinastu lutirnar. Tilfarið er einfalt og greitt og latið í lættan góðan málbúna.

*Eg trúgvi* er útkomin í mongum londum – í Noregi í 75000 eintøkum. Bókin er endurskoðað og broytt fleiri ferðir. Í bókini er eisini ein lestrarætlan.

Carl Fr. Wisløff er kendur í mongum londum sum gudfrøðingur, kirkjufrásøgumaður, prædikumaður og høvundur. Hann skarar fram úr sum kristin oddamaður við greiðari bíbliutrúgvari áskoðan.

Bókin kann keypast frá Heimamissiónsforlagnum og í bókhandlum runt um landið. Hon kostar kr. 169,00.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Hvat barnsliga avgerðin hjá FUR veruliga merkir

**Agga Niclasen**

*attitude@niclasen.fsnet.co.uk*



Við einum uppvaksandi ættarliði til reiðar at taka sær løgir, tykjast evropeisku framtíðarvánirnar serliga bjartar. Ein vísindalig kanning við støði í 15 býum tvørturígjøgnum Evropu sigur nevniliga, at børn borin í heim síðani 1985, "sólskinsunglingar" at navni, eru sosialt vitbundnari, politiskt virknari, minni sosialistisk og kapitalistisk, væl meira tollynt og leys frá fordómum og, í síni heild, meira liberal enn líkasæla og ófantaliga "kynslóð X", sum gekk undan teimum.

Meðani ein unglingi evnaður av ónossliga, anti-intellektuella Kurt Cobain-ættarliðnum brúkti bróðurpartin av degnum uppá at koma fram á nýggjar hættir at sleppa undan at vaska og hugsa, vil ein sólskinsunglingi—kringaður av fjølbroyttum hugburði og, sum fylgju, fløkjasligari støðutakan—søkja ábyrging. Teir elska ES. Brýggja seg um mannarættindi og altjóða løgfrøði. Teir vilja lætta um hjá menningarlondum við at koma skuldini til lívs. Og so eru teir eisini umhvørvisvitandi.

Og sólskinsunglingarnir, í mun til formannin fyri KFUM-skótarnar í Føroyum, Trygvi Sigurðsson, eru ikki plágaðir og stýrdir av ótta og andstygd fyri øllum fremmandaliga "nýggjum". Nei, sólskinsunglingarnir trúgva ikki bara uppá frían flutning av vørum, tænastum og kapitali, men eisini fólki. Og, meira beinrakið, eiheldur høvdu teir verið barnsliga bangnir fyri samkyndum og einum fullkomiliga skynsamiligum ynski at gerast partur av Føroya ungdómsráð og, so við og við, eini samlaðari, samfelagsligari uppítøku.

Tað er so lætt at grundgeva fyri hví felagið Friðarbogin [sic] – hvat er tað við føroyingum og nøvnum – eigur at vera partur av FUR. Kortini, hetta er málinum óviðkomandi, við tað at felagið hjá samkyndum í Føroyum longu var stillað inn av starvsstjórnini; og hetta er væl tí at starvsstjórnin hjá FUR var komin til ta niðurstøðu, at øll krøv eru lokin fyri limaskap í Føroya ungdómsráð... bara hjá nøkrum óliberalum homofobum at havna heimilaðu umsóknini.

Men, eg visti tað altíð! Avgerðin hjá FUR ikki at loyva felagið fyri samkynd í Føroyum innliman í henda, eftir øllum at døma, óliberala felagsskap kann ikki annað enn vátta mínar fordómar um eitt nú grønar skótar: at teir altíð hava verið ótolandi barnsligir. Og, eftir slíkan barnsligan atburð, er tað tá nakað undur í, er tað tá tilvildarleikur, at meðani vit, "teir gulu", surraðu, spældu "teir grønu" – KFUM-skótarnir hinumegin ánna – pikk?

Jú, har vóru aðrir felagsskapir – 14 ímóti 4, ið atkvøddu ímóti at Friðarbogin skuldi gerast FUR-limur við tí annars skilvísa úrsliti, at umsóknin fall. So, hví velji eg KFUM-skótarnar burturúr? Tí at eg var "gulur"? Kanska, men fyrst og fremst tí at hvør atkvøða má átaka sær ábyrging og at eg í hesum sambandi var vitni til ta mest anti-inellektuellu, ja, barnsligu "grundgevingina" aftanfyri hesa sigandi avgerð: "Tað einasta vit kenna til Friðarbogan er, at tað er felagið fyri samkynd (Trygvi Sigurðsson við Eyðgerð Kruse, Dimmalætting"). Sum er, vissuliga, tað sama sum at siga: "Tað einasta vit kenna til Brøðrasamkomuna er, at tað er felagið fyri baptistar". Ella: "Tað einasta vit kenna til TB er, at tað er felagið fyri fótbóltsspælarar í Tvøroyri". Ella, og aftaná at hava góðtikið sín býttleika: "Tað einasta vit kenna til Skótalið Sigmunds Brestissonar er, at tað er eitt felag fyri, ja, ø, ja-ja, ókey meðni, skótar... for hundans!" Júst so, hr. vera sær sjálvum nóg mikið-Sigurðsson, gott klárað... fyri skótar. Og skótar spæla sjálvandi ikki pikk, men surra. Og samkynd spæla sjálvandi ikki – ókey, eg viðgangi, vánaligt orðaval – pikk, men, um teirra minnilutastøðu, arbeiða vegna øktum kunningararbeiði, meira sínámillum virðing, minni sundurgreining, at vera meira hugað at hugsa fyri okkum sjálvi og, tað kritiska punktið, at vera meira opin mótvegis seksualiteti. Var hatta nú so torført, hr. Sigurðsson?

Gaman í, formaðurin fyri KFUM-skótarnar í Føroyum skoytti komandi uppí áðurnevndu "grundgeving": "Felag okkara er grundað á tey kristligu sjónarmiðini og vit arbeiða útfrá tí kristnu siðalæruni". Men slíkar "grundgevingar" eru eyðvitað bara bílagdar andaliga endurføddum mammureyvum at gera sær dælt av, tá ið vanligur intellektualitetur og bíbliutýðing eru í uppisetri.

Samanumtikið var altso umsóknin havnað uttan grundgeving – og hetta er opinberiliga "í lagi" eftir rummalareiggj-viðtøkunum hjá FUR at døma. Í hesum sambandi, tann einasta vælgrundaða grundgevingin fyri ikki at loyva Friðarboganum innliman skuldi tá verið orsakað av sjálvum navninum.

Men avgerðin hjá Føroya ungdómsráð ikki at loyva felagnum fyri samkynd inn í hitan ber sjálvandi prógv um eina, ikki bara homofobiska, men undirliggjandi tornæma tjóð soleiðis sum ein órógvandi stórur partur av tess íbúgvum skúgvar til viks einhvønn mannsømandi progressivitet; eitt etos, menniskjasligt framtak, liberalt-sinnað lond í veruligari menning aðramáta hvíluleyst royna at betra.

Eitt er, at henda gamalsliga atgonga, at alt, sum fyriferst uttanfyri okkara "serstøku" tjóð ikki kemur okkum við, sambært grundreglu, er skeiv. Men um okkara afturhaldandi støðu til millum annað samkynd, men so sanniliga eisini fólkainnflytan dragna vit afturút í tørvinum á at vera á "skerandi kantinum" so at, sum land, veraført fyri at taka á seg umskifti. Og talan er altso um broytingar, sum ígjøgnumseyrandi og loyvisleyst detta á okkum og okkara góðvarnu heimligheit. Í stuttum: vit kunna ikki longur loyva okkum at stinga heysin í kongsjørð og, eftir besta førimuni, syngja hissini láturligani romantiskan tjóðveldissang sum vit leggja ein fanans lort í alt, sum ikki sjálvkomið ella beinleiðis rakar okkum... fyri okkara skuld.

Yvirhøvur er tað flóvisligt at "taka ímóti" nøkrum, ið undir ongum umstøðum ikki kann víkjast frá, bert tí at tað onkursvegna er vorðið noytt á okkum, og ikki hugsað ígjøgnum. Men í hesum finst helst svarið til hví abstrakta uppfatanin av tí støðugt meira progressiva Evropa er meira seljandi til hasi, sum njóta abstrakta hugsan og stórfingnar ætlanir, enn tey, sum annaðhvørt heldur vilja hjálpast, sum best ber til, ella – eins og vit – "elska" høgleika, hugnað og púrasta líkasælu.

Í eini grein í Sosialinum á valdegnum í ár helt Kári á Rógvi fyri, at vit høvdu tosað í so nógv um tey samkyndu uppundir valstríðið. Tvætl! Ikki einans eru livikor og rættindi hjá teim samkyndu umráðandi í sjálvum sær, men vil so sanniliga eisini virka sum eitt rimmar ávísi fyri – í hesum føri – floksins grundliggjandi moral. Nú eri eg tíbetur ikki serkønur í løgfrøði, men politikki, og einhvør lóggáva skuldi helst verið ein akkumulerað og støðuliga endurskoðað úrtøka av morali.

Men tó at progressivu Føroyar vóru fyri einum bakbresti soleiðis sum Friðarbogin fekk krakk í síni samvitskufullu áheitan at verða veittur og veita eina hjálpandi hond millum ung sum partur av Føroya ungdómsráð, er samlaði samkynju-spurningurin kortini komin nakað á mál. Eitt er, at felag fyri samkyningar er stovnsett, men– og týdningarmeiri – tey dylja ikki sína samkynd í sama mun longur og kundu tí, sum avleiðing, mynda felagið: ætlandi ein íkomin viðgangur so við og við sum tey hava hildið seg verið betri før fyri at "spretta" og sum aftur stendst av øktari og áhaldandi umrøðu. Men, bara nakað. Tí barnsliga avgerðin hjá FUR ber jú prógv um eitt barnsliga bangið land, sum heldur enn gjarna vil hava sínar borgarar búgvandi í fremmandalondum, men ikki so øgiliga gjarna hava fremmandafólk búgvandi í okkara landi; og eitt land, sum enn heldur tað vera, ikki bara løgið, men vamlisligt at síggja tvey mannfólk leiðast.

Men progressivu Føroyar, tey anti-líkasælu, tey langskygdu, tey vaksnu, mugu ikki ganga og lúnast sum eitt forkelað barn, men brúka bakbrestin á uppbyggjandi hátt. Og tí er tað, at samtíðis sum vit kraftamikið skula díkja á so at fremja politisk mál sosum "skrásett parlag" og at kriminalisera einhvønn mismun mótvegis samkyndum í arbeiðs- og húsamálum, muga kondemnera eitt og hvørt slag av homofobi, hvar enn so hetta barnsliga bangilsi dagar.

Men við einum lítið liberalt-progressivum Sambandsflokki verður torført. Sostatt verður stríðið fyrst og fremst mentanarligt. Í 21. øld er tað tríggjar ferðir so trúligt at samkyndir tannáringar royna at beina fyri sær enn kynvísir unglingar. (Aleina hetta hagfrøðital átti at fingið okkum niður á knø og homofobar at skammast.) Og "bøssi" er enn ein handahóvsháð millum ung.

Her er ikki bert talan um nakrar fáar hálvvaksnar dreingir, ið plága og gera seg inn á samkynd børn. Hetta er partur av eini djúpari og inntonktari mentanarhomofobi—sum, nú eg kortini komi tysjandi, sjálvandi einki sum helst hevur við bíblíutýðing at gera—eggjað til og vitleyst promoverað av, ja, tey kalla seg vaksin, og tessvegna áttu at vitað betri.

Homofobiska niðurbrótingin í Føroyum fer at taka langa tíð. Men arbeiðslagið er beint frameftir: homofobar muga konfronterast við tí epidemiska sjálvhaturi, teir birta uppundir, í skúlum, á arbeiðsplássum og í fjølmiðlum.

Fyrst tá, og við eini proaktivari hendurnar burtur!-atgongu mótvegis okkara liberalu "sólskinsunglingum" til reiðar at taka sær løgir, gongur dreymurin um einar progressivar Føroyar út. Nemið ikki við, tilkomna fólk!

Ímeðan eiga vit at flyta burtur hasar 1,1 milliónirnar í donskum peningi, sum, sambært løgtingslóg nr. 34 frá 23. apríl 1999, Føroya ungdómsráð fær frá spf. Ítróttarvedding, yvir í, nei, ikki Friðarbogan, men til anti-homofobiska upplýsing yvirhøvur. Men "hesuferð" – í mun til atferðsmynstrið hjá formanninum fyri KFUM-skótarnar í Føroyum—við grundgeving: homofobi... ella tornæmi!

# Hvat hendir nú?

**Kári P. Højgaard**

*løgtingsmaður*



Í grein á portalinum skrivar Áki Bertholdsen áhugaverda grein undir yvirskriftini: **Loysti seg hjá Bjarna Djurholm at hava tol.**

Í greinini støðgaði eg á við hetta brotið.

*Somuleiðis kann hugsast, at nevndin fær til uppgávu at gera metingar um, antin tað kann verða til gagns fyri samfelagið at skapa karmar fyri stórrakstrargørðum í miðstaðarøkinum t.d. bíliga mjólkaframleiðslu, sum skal kunna bera seg uttan stuðul frá tí almenna.*

Fyrsta treytin fyri at hesin tankin verður veruleiki er, at garðarnir ikki gerast meira skuldarbundnir og at mjólkarkvoturnar verða avtiknar við fríari kapping.

Tað sum nú hoyrist er, at mjólkakvotur verða handlaðar fyri stórar upphæddir. Um garðar skulu gjalda rentur og avdrátt av lánum til keyp av mjólkakvotum, á sama hátt sum við keyp og sølu av fiskidøgum, kunnu vit gloyma alt um bíliga mjólk og minkandi stuðul.

Bert umleið 10% av jørðini her á landi er dyrkað. Tað átti at verið skylda hjá teimum sum hava trøð ella festi, at dyrkaða jørðin var nýtt sum bit ella bleiv sliin einaferð um árið, so hon ikki aftur verður til haga av vanrøkt; hesa virðing skylda vit forfedrum okkara. Talan er eisini um stórar nøgdir av stráfóðri, sum verða innfluttar.

Í útoyggj og á smáplássum er landbúnaðurin í serstøðu og eigur landsmyndugleikin at taka hetta til eftirtektar. Her eiga alternativir møguleikar at kannast og stuðul veitast til verkætlanir, ið kunnu gera okkum meira sjálvbjargnar við kjøti og landbúnaðarvørum. Her er jørðin og tað ið kann fáast av henni nærum einasti inntøkumøguleiki.

Annars fegnist eg um ætlaninar at seta eina nevnd við breiðari umboðan at stinga út í kortið og gera uppskot um, hvussu landbúnaðurin skal skipast framyvir.

Fegnist somuleiðis um, at landstýrismaðurin hevur tikið nógvar av teimum viðmerkingum, Sjálvstýrisflokkurin hevur havt til uppskotini, við í sínar framtíðarvisiónir. Tað er rætt at kanna fyrimunir og vansar av at selja smærru festini, um smáfestarar og traðarfólk skulu fáa møguleikan at keypa síni brúk.

Tað má vera pláss fyri áhuga, partvís riknum og fullriknum brúkum.

Bíða verður í spenningi eftir næsta leiki.